# Vit hava runnið ef

*– Vit javnaðarfólk skulu ikki sleppa øllum, og broyta alt tað, vit hava staðið fyri. Hinvegin er talan um eina nýggja tíð, og tí eru vit noydd at seta okkum sjálvum nýggjar spurningar, men grundhugsanin er framvegis tann sama, sigur svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson*
*Mynd: Bárður*



**Svenski forsætisráðharrin og formaðurin í Javnaðarflokkinum, Gøran Persson, heldur ikki, at Javnaðarflokkar í Evropa hava gjørt nóg mikið fyri at tálma sterku altjóða marknaðarkreftunum seinastu árini. – Vit mugu altíð vera til reiðar at finnast at okkum sjálvum, og tað er eingin ivi um, at vit kundu havt gjørt tað betri viðvíkjandi altjóðagerðini, sigur sviin, ið hevur vitjað Føroyar um vikuskiftið**

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

Tað er leygardagur 20. august. Sólin skínur oman og niðan, og í Miðlahúsinum í Vágsbotni vitjar ein mest kendu og virðismettu evropeisku politikarunum.

Eingin ivi er um, at talan er um ein politiskan kapasitet av teimum heilt stóru, og samstundis er hann menniskja, sum hvílir í sær sjálvum.

Gøran Persson er lítið pátikin, fryntligur og dugir væl at lurta og svara.

– Umhvørvi, globalt demokrati og eitt væl útbygt vælferðarsamfelag eiga at vera hjartamál hjá øllum javnaðarflokkum, sigur hann, og hugsanir mínar fara til politiska samstarvsfelaga hansara í Onglandi.

– New, new, new, everything is new. We have to reform ourselves or we die.

Bretski forsætisráðharrin og formaðurin í bretska Javnaðarflokkinum, Tony Blair, legði ikki fingrarnar í millum á ráðstevnu hjá Javnaðarflokkunum í Evropa, sum varð hildin í svenska býnum Malmø í 1997.

Bretski javnaðarleiðarin hevði eisini alla orsøk til at veipa við ørmunum. Gjøgnum nítiárini høvdu Javnaðarflokkarnir flutt seg nógv, og mong av gomlu grundsjónarmiðunum vóru ikki at fáa eyga á longur.

Frá at vera heitir talsmenn fyri, at tað almenna hevði umfatandi eftirlit við búskapinum, gingu Javnaðarflokkarnir á odda fyri umfatandi einskiljingum av almennum ognum. Upprunaliga vóru Javnaðarflokkarnir eisini mótstøðumenn av Evropa Samveldinum, men henda mótstøða fánaði meir og meir burtur í áttati og nítiárunum, og fleiri av flokkunum fóru í staðin fyri at vera andstøðingar at síggja ES sum eitt hent amboð at røkka longri á vælferðarøkinum.

Formella samstarvið við fakfeløgini og sambandið við arbeiðarastættina viknaði eisini alsamt seinastu árini í 20. øld, og Javnaðarflokkarnir gjørdust alt meiri miðflokkar, heldur enn at vera flokkar á vinstravonginum.

20. øld var øldin hjá Javnaðarflokkum. Stóra verkætlanin, vælferðarstaturin, fekk veruliga fastatøkur í nógvum londum í serliga Norðurevropa, men avbjóðingarnar í 20. øld eru nógv øðrvísi enn avbjóðingarnar í 21. øld, og tí eru Javnaðarflokkarnir noyddir at endurskoða sín politikk og laga hann til broyttu fyritreytirnar, sum eru eyðkendar av individualismu heldur enn samhaldsfesti og mentunarligari, búskaparligari og politiskari altjóða gongd heldur enn tjóðarbygging.

## Sama hugsjón

– Tað er ómetaliga týdningarmikið at leggja sær í geyma, at grundleggjandi javnaðarhugsjónin framvegis er tann sama, sum hon altíð hevur verið. Vit javnaðarfólk skulu ikki sleppa øllum, og broyta alt tað, vit hava staðið fyri. Hinvegin er talan um eina nýggja tíð, og tí eru vit noydd at seta okkum sjálvum nýggjar spurningar, men grundhugsanin er framvegis tann sama.

Svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson, tekur als ikki undir við teimum, sum skíra grundhugsjónina hjá Javnaðarflokkum fyri ótíðarhóskandi og í ringasta føri fyri deyða.

Spurdur, hvørji ítøkilig øki, ein Javnaðarflokkur í 21. øld eigur at leggja seg eftir svarar fryntligi sviin:

– Umhvørvi, globalt demokrati og eitt vælútbygt vælferðarsamfelag eiga at vera hjartamál hjá øllum javnaðarflokkum. Øll trý málini eru rættiliga umfatandi, og á hesum økjum er nógv at tríva í.

Gøran Persson vísir á, at í løtuni fyllir umhvørvisspurningurin nógv í hansara hugaheimi.

– Tað er einki dulsmál, at heimurin í dag nærum er bundin av olju, og hetta hevur álvarsamar avleiðingar við sær fyri umhvørvið. Samstundis sum vit gerast meira og meira bundin av olju, størri ávirkan hava høgu oljuprísirnir á okkara búskap. Men vit kunnu velja eina aðra leið. Vit mugu ongantíð ov skjótt bera so í bandi at fáa fleiri og størri íløgur gjørdar í verkætlanir, sum royna at menna nýggjar orkukeldur, sum fara betri um umhvørvið.

Svenski forsætisráðharrin heldur, at endamálið við menningini av nýggjum orkukeldum eigur at vera tvíbýtt.

– Vit mugu varðveita búskaparliga vøksturin, men umhvørvið skal ikki rinda prísin. Vit skulu hinvegin miða ímóti at varðveita vøksturin og samstundis taka veðurlagsbroytingarnar í størstum álvara, sigur hann.

## Alheimsgerðin

Eitt veruligt valdsskifti er farið fram á altjóða pallinum seinastu 20 árini. Nationalstaturin, sum setti dagsskránna og hevði eftirlit við vinnulívinum, hevur av álvara mist fótafestið, og risastóru fleirtjóða-fyritøkurnar gera í størri og størri mun sjálvar av, hvussu tær skipa seg uttan um politisku myndugleikarnar.

Fyritøkurnar virka ikki longur nationalt, men hinvegin globalt, og hetta hevur havt sær, at politisku myndugleikarnir renna aftan á stórfyritøkunum og kenna seg noyddar at taka undir við avgerðunum og ætlanunum, sum stór-fyritøkurnar stinga út í kortið. Frá at nationalstaturin hevði eftirlit við fyritøkunum, er hann í dag noyddur at geva seg undir stórfyritøkunum.

Fleiri á vinstravonginum eru av teirri áskoðan, at vinstri vongurin og serliga Javnaðarflokkarnir hava sitið hendur í favn, og latið fríu marknaðarkreftirnar ótálmaðar fáa frítt rásarúm, meðan grundleggjandi menniskjalig, sosial og mentanarlig atlit ikki hava verið tikin.

Eitt aðalmál hjá javnaðarflokkum hevur søguliga verið at stýra marknaðarkreftunum við regluleringum av øllum handaslagi, men eftir globaliseringin er vorðin veruleiki, hava Javnaðarflokkarnir havt torført við at sett síni fingramerki á sterku globalu marknaðarkreftirnar.

*Ert tú samdur í, at Javnaðarflokkarnar í Evropa hava verið ov seinir á sjóarfallinum viðvíkjandi alheimsgerðini?*

– Eg vildi logið, um eg segði nei til handan spurningin. Vit mugu altíð vera til reiðar at finnast at okkum sjálvum, og tað er eingin ivi um, at vit kundu havt gjørt tað betri. Ein týdningarmikil spurningur er kortini, um nakar annar hevði kunnað gjørt tað betur enn vit, og tað trúgvi eg ikki, svarar Gøran Persson.

Spurdur, hvør høvuðsorsøkin er til, at Javnaðarflokkarnir hava latið altjóða fyritøkunum so stórt vald, svarar svenski forsætisráðharrin:

– Ein stórur hevur trupulleiki verið, at politisku skipanirnar á aljóða stigi eru rættiliga veikar, og